# *Samandráttur av Bygdaráðsfundi 27.01.2014*

**<u>Bygdaráðsfundur 27.01.2014 kl. 16.00 til kl. 19.15</u>**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhøli | |
| Hjástødd: | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Mortan Højgaard | x |
| | Jákup A. Olsen | x |
| | Súnfríð Jacobsen | x |
| | Marjun Gaardbo skr. | x |

**<u>Til viðgerðar:</u>**

**<u>Mál nr. 1/2014 Fíggjarmál</u>**

<u>J. nr. 2014-0011-0040</u>

**Málslýsing**

Rakstrarætlan fyri 2014 hjá Kongshavnar Havn er komin til ummælis hjá Nes kommunu.

**<u>Høvuðstølini í fíggjarætlanini eru hesi:</u>**

| | Ætlan 2014 | Ætlan 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|
| Netto inntøkur | 594.000,00 | 504.000,00 | 592.437,85 |
| | | | |
| Í alt | 294.500,00 | 306.500,00 | 147.929,79 |
| Úrslitið áðrenn rentur v.m. | 299.500,00 | 197.500,00 | 444.508,06 |
| Rentuinntøkur | 6.000,00 | 6.000,00 | 3.900,88 |
| **Ársúrslitið** | **305.500,00** | **203.500,00** | **448.408,94** |

**Tilmælið**

Á fundi 22.01.2014 mælir Fíggjarnevndin til at viðmæla rakstrarætlanina, hjá Kongshavnar Havn, fyri 2014.

Súni í Hjøllum, sum er formaður í Kongshavnar Havn, var úti meðan málið var viðgjørt.

**Avgerð**

Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

Súni í Hjøllum, sum er formaður í Kongshavnar Havn, var úti meðan málið var viðgjørt.

# *Samandráttur av Bygdaráðsfundi 27.01.2014*

**Mál nr. 3/2014 Ymiskt**
J.nr. 2014-00
**Málslýsing**
Rennigravarin, hjá Nes kommunu, er 4 ár, og hevur kommunan havt ymiskar smærri umvælingar í fjør, og koma tær helst at verða fleiri komandi ár. Tað verður tí mett skilagott, at leasa ein nýggjan rennigravara, ístaðin fyri núverandi.

**Tilmælið**
Á fundi 22.01.2014 mælir Fíggjarnevndin til at gera eina nýggja Leasingavtalu, sum umfatar nýggjan rennigravarin.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 4/2014 Starvsfólkamál**
J.nr. 2013-003-0026
**Málslýsing**
Jan Petersen sum hevur verið í farloyvi, frá starvinum sum arbeiðsformaður hjá Nes kommunu, fram til 31.12.2013, biðjur um at fáa longt sítt farloyvi fram til uml. 25.08.2014.

**Tilmælið**
Á fundi 14.01.2014 mælir Tekniska nevnd til, at Jan fær longt sítt farloyvi fram til 25.08.2014 og at boða honum frá, at farloyvið ikki verður longt eftir 25. august 2014.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 5/2014 Byggimál**
J.nr. 2014-0042-0326
**Málslýsing**
Í skrivi 06.01.2014 søkja Húsahagi og Neshagi um loyvi til at byggja eitt felags seyðahús við Kornvatn, uml. har rættin hjá Leivur stendur í dag.

Somuleiðis verður søkt um ein traktorveg úr Agninum og norður móti rættini hjá Leivuri, har ætlanin er at seta húsið.

**Tilmælið**
Á fundi 14.01.2014 mælir Tekniska nevnd til, at umsóknin verður send til ummælis, hjá Friðingarnevndini fyri Eysturoy, og at søkt verður Landsverk um íbinding til Agnið.
Elin á Torkilsheyggi var úti meðan málið var viðgjørt.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.
Elin á Torkilsheyggi var úti meðan málið var viðgjørt.

**Mál nr. 6/2014 Umhvørvismál**
J.nr. 2014-0047-0033
**Málslýsing**
Í skrivi 08.01.2014 søkir festari um undantaksloyvi til at taða fram við vegjaðarinum á Mylluvegnum, í tíðarskeiðnum áðrenn 15. mars. Økið søkt verður um, er uml. 100 metur sunnanfyri kunstverkið og út eftir vegnum, suðureftir.

**Tilmælið**
Á fundi 14.01.2014 mælir Tekniska nevnd til at geva festaranum undantaksloyvi til at taða fram til 15. mars 2014. Tekniska deild ávísur økið.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 7/2014 Byggimál**
J.nr. 2014-0042-032757
**Málslýsing**
Í skrivi 10.01.2014 søkir Borgar Hansen um byggiloyvi til drívhús.

Ætlanin er byggja tað fast í sethúsini, norður ímóti grannamarkinum. Fráleikin til grannamarkið er 0,5m , og undurskrivaður grannasáttmáli fyriliggur.

Fasadan verður alustólpar við glasi ímillum. Tekjan verður úr aluminium.

**Tilmælið**
Á fundi 14.01.2014  mælir Tekniska nevnd til at játta byggiloyvið til drívhús samb. innsendu tekning.
Niclas Davidsen var úti meðan málið var viðgjørt.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.
Niclas Davidsen var úti meðan málið var viðgjørt.

**Mál nr. 8/2014 Mentanarmál**
J. nrr. 2013-0023-0136
**Málslýsing**
31. august 2014 verða 50 ár síðan syndarligu vanlukkuna á Toftavatni (innara vatn), har 3 smádreingir druknaðu.

Í tí sambandi verður søkt um loyvi til at seta upp minnisplátu.

**Tilmælið**
Á fundi 15.01.2014 mælir Mentarnevndini til, at avvarðandi fáa loyvi til at seta minnisplátu við Toftavatn (innara vatn), og at hetta verður gjørt í samráð við kommununa.

**Avgerð**
Tilmælið frá Mentanarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 9/2014 Mentanarmál**
J.nr. 2014-0019-0057
**Málslýsing**
Í skrivi 03. 01. 2014 søkir Tofta Talvfelag, eins og undanfarin ár, um fíggjarligan stuðul fyri árið 2014.

**Tilmælir**
Á fundi 15.01.2014 mælir Mentarnarnevndin til at veita Tofta Talvfelag ein stuðul á 12.000,00 kr., sum er avsett á fíggjarætlanini fyri 2014.

Á fundi 22.01.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini, og at peningurin verður tikin av stovninum stuðul til ítrótt.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini og Mentanarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 10/2014 Mentanarmál**
J.nr. 2013-0019-0054
**Málslýsing**
Í skrivi 09.12.2013 søkir Lise Nolsøe um stuðul, til útgávu av Tofta Siglingarsøgu, við eini peningaupphædd ella við at bíleggja nakrar bøkur.

Maður Lise Nolsøe, Páll J. Nolsøe, andaðist í 1996 og legði hann eftir seg eitt handrit, sum Pól á Kletti er farin í gongd við at seta saman. Ætlanin er er Tofta Siglingarsøga skal koma út á várið 2014.

**Tilmælir**
Á fundi 15.01.2014 mælir Mentarnarnevndin til at veita stuðul á kr. 10.000,-.

Á fundi 22.01.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini, og at peningurin verður tikin av stovninum stuðul til mentan.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini og Mentanarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 11/2014 Mentanarmál**
J.nr. 2013-0019-0053
**Málslýsing**
Í skrivi 05.12.2013 søkir tíðarritið Varðin um stuðul við, at gerast haldari av Varðanum, kostnaðurin er 200,- kr. um árið.

Ætlanin er at víðka øki Varðans til føroyska mentan sum heild, til dømis sjónleikir, fyrilestrar, framsýningar og onnur tiltøk. Hetta kemur at kosta eitt sindur av peningi - serliga kostar tað at fáa føroysk vísindafólk at skriva greinar og verða við í kjaki og samskifti.

**Tilmælir**
Á fundi 15.01.2014 mælir Mentarnarnevndin til at veita stuðul við at gerast haldari.

Á fundi 22.01.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini, og at peningurin verður tikin av stovninum stuðul til mentan.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini og Mentanarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 12/2014 Mentanarmál**
J.nr. 2014-0024-0020
**Málslýsing**
Í skrivi 02.01.2014 søkir Svimjufelagið Flot um stuðul til 1. liðið hjá Flot, sum skal á venjingarlegu í Esbjerg í døgunum 10. – 18.04.2014. Venjari er Rúni Gaardbo.

Tað eru 6 luttakarar sum fara á venjingarlegu har ein er á landsliðnum, ein á juniorliðnum og ein á ungdómslandsliðnum.

**Tilmælir**
Á fundi 15.01.2014 mælir Mentarnarnevndin til at veita stuðul til Flot á 3.000,00 kr.

Á fundi 22.01.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini, og at peningurin verður tikin av stovninum stuðul til mentan.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini og Mentanarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 13/2014 Mentanarmál**
J.nr. 2013-0019-0055
**Málslýsing**
Í skrivi 11.12.2013 søkir Føroya Fuglafrøðifelag - landsfelag fyri fuglakannan og fuglavernd - um stuðul á 500,- kr.

Felagið hevur sum endamál at fremja kannan og vernd av landsins fuglalívi, og at birta og halda uppi almannaáhuga fyri fuglasløgum, og fuglaumhvørvi.

**Tilmælir**
Á fundi 15.01.2014 mælir Mentarnarnevndin til at veita stuðul til Føroya Fuglafrøðifelag á 500,00 kr.

Á fundi 22.01.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini, og at peningurin verður tikin av stovninum stuðul til mentan.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini og Mentanarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 14/2014 Mentanarmál**
J.nr. 2013-0024-0019
**Málslýsing**
Í skrivi 02.12.2013 søkir Faroe Soccer um fíggjaligan stuðul.

Faroe Soccer er felag sum skrásetur allan føroyskan fótbólt. Teir hava, seinastu 10 árini, innlisið uml. 15.000 dómaraseðlar í teirra stóra dátugrunn: manningar, mál, kort, skiftinar minnuttøl osf. Úrslitið av hesum sæst á heimasíðuni og er til frítt brúk fyri øll. Síðan hjá Faroe Soccer er einasta síða av sínum slag í Føroyum.

**Tilmælir**
Á fundi 15.01.2014 mælir Mentarnarnevndin til at veita stuðul til Faroe Soccer á 1.000,00 kr.

Á fundi 22.01.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini, og at peningurin verður tikin av stovninum stuðul til mentan.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini og Mentanarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 15/2014 Mentanarmál**
J.nr.2013-0023-0123
**Málslýsing**
Uppskot um sáttmála um at skriva Tofta søgu.
Fyrireikingarbólkur, sum umboðar Nes kommunu, hevur vent sær til Helga Jacobsen til tess at fáa hann at skriva Tofta søgu. Fyrireikingarbólkurin hevur skotið upp, at bygdarsøgan fær heiti eftir høvuðsbygdini, "Tofta søga", og at allar tríggjar bygdirnar, Nes, Toftir og Saltnes, verða nevndar í undirheitinum. Helgi Jacobsen hevur játtað at skriva bygdarsøguna og ætlanin er fara undir arbeiðið 1. maj 2014.

Høvundurin hevur hálvtannað ár at skriva Tofta søgu, og málið er at koma undir land við bókini í hesum tíðarskeiðinum.

Høvundurin ímyndar sær, at fyrireikingarbólkurin fær nýggj mál og nýggjar uppgávur og gerst ein fylgibólkur, eftir at arbeiðið er farið í gongd. Tað hevur stóran týdning, at staðkøn fólk í eini handavending kunnu svara spurningum um keldur og persónar, tá tørvur er á upplýsingum. Afturímóti kann fylgibólkurin við jøvnum millumbilum fáa innlit í skrivaða handritið.

Høvundurin bindur seg til at senda fylgibólkinum nýtt tilfar við endan á hvørjum ársfjórðingi.

Høvundurin váttar somuleiðis, at hann eftir bestu sannføring vil leggja nógva orku í at fáa eitt so gott bókaverk um Tofta søgu, sum hann eftir førimuni megnar.

**Tilmælir**
Á fundi 15.01.2014 mælir Mentanarnevndin til at taka undir við sáttmálanum, sum hann er uppsettur.

Á fundi 22.01.2014 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini, og at borgarstjórin og skrivarin fáa heimmild til at undirskriva sáttmálan og gera smærri tillagingar.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini og Mentanarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 16/2014 Havnamál**
J.nr. 2014-0046-0068
**Málslýsing**
Hoyringsskriv, er komið frá Landsverk, um ætlan at broyta siglingarleiðina inn á Skálafjørðin og at seta nýggjan vita upp v.m. í hesum sambandi.

Við broyting í 2012 av kunngerð nr. 134/2009 um sjúkufyribyrgjandi rakstur av alibrúkum varð sjóøkið millum Kalbaksnes, Raktanga og Eystnes lagt afturat alifjørðinum Kollafjørður/Tangafjørður

og varð við hesum tilskilað sum møguligt aliøki. Eftirfylgjandi fekk loyvisfyrisitingin hjá Heilsufrøðuligu Starvsstovuni umsókn um aliøki út fyri Nes.

Soleiðis, sum verandi siglingarleið fram við landi er, ber ikki til at fáa líkinda aliøki undir Neslandinum. Landsverk hevur tí kanna møguleikarnar fyri at leggja siglingarleiðina inn á Skálafjørðin longri frá landi fyri at fáa pláss fyri alivirksemi. Landsverk hevur í hesum sambandi ráðført seg við m.a. Søfartsstyrelsen og Kongshavnar Havn.

Úrslitið av hesi ætlan er, sum í høvuðsheitum fevnir um, at vitavinklarnir suðureftir á Tofta vita verða sløktir, og at nýggjur vinkulviti verður settur upp á Strondum til at marka siglingarleiðina inn á Skálafjørðin sunnanífrá.

Í skjølum sum fyriliggja í málinum eru verandi vitar vístir og nágreiniliga verður víst teir nýggju vitavinklarnar.

Tað er ætlanin hjá Landsverki, at aliøki kunnu leggjast fram við Neslandinum ikki nærri enn 100 metrar at hvíta vinklinum hjá nýggja vitanum, og ikki nærri landi enn at bátar skulu kunna sigla millum land og alistøðina. Viðmerkjast kann, at alistøðir skulu merkjast við ljósum v.m. sambært kunngerð nr. 29/2009 um merking av sjógvalistøðum og siglig nærhendis. Hoyringsfreistin er 12. februar.

Havnameistarin hevur hugt uppá málið um broyting av siglingarleiðini inn á Skálafjørðin. Havnameistarin hevur onga viðmerking til broytingina, av siglingarleiðini inn á Skálafjørðin, og metur hann, at við tí nýggja vitanum á Strondum verður tað, eins trygt at sigla inn á fjørðin, sum tað er í dag.

**Tilmælið**
Á fundi 27.01.2014 mælir Bygdaráðið til at taka undir við broytingini av siglingarleiðini inn á Skálafjørðin, soleiðis sum Landsverk vísir á.

**Avgerð**
Tilmælið frá Bygdaráðnum einmælt samtykt.